# UM IRF

IRF er ein interkommunalur renovatiónsfelagsskapur, sum allar kommunur í Føroyum, við undantaki av Tórshavnar kommunu, eiga og reka í felag. Virksemið hjá IRF fevnir um øki hjá teim 28 limakommununum í felagnum.

Hjá IRF starvast umleið 100 fólk. Virksemið hjá IRF fevnir um:

- Innheintan av húsarhalds – og virkisburturkasti
- Endurvinningarhøll
- Móttøkuhøll
- Brennistøð
- Reinsitænastu
- Oljureinsiverk
- Handfaran av serliga dálkandi burturkasti
- Móttøku- og tyrvingarpláss í Trøllavík í Suðuroy
- Jarnendurnýtslu á Gjánoyri í Norðstreymoy
- Bilvrakpláss í Klaksvík, Sandoy og Suðuroy
- Bilverkstaður í Klaksvík

- Rottanga- og tyrvingarpláss úti í Nýggjheiðum í Kvívík (klárt síðst í 2022)

Les umhvørvispolitik felagsins her.